## Filmur um veiðimannin

Grønlendsku Juanna og Kunuk Platous, sum eru systkin, hava gjørt ein film um lívið hjá einum grønlendskum veiðimanni í dag, og hvussu tað var fyri 70 árum síðani. Juanna fekk hugskotið til filmin, tá hon og sambúgvi hennara búðu í bygdini Qaanaaq fyri nøkrum árum síðani. Hon sigur við KNR, at í veruleikanum er veiðimannalívið lítið broytt tey seinastu 70 árini. Juanna Platous vónar, at filmurin fer at hava áhuga uttan fyri Grønland.



*Grønlendska veiðimannalívið er lítið broytt seinastu 70 árini*

*(Mynd: KNR)*

## Fólkaatkvøða um evruna

Tað er komið óvart á danskar politikarar, at Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, í samrøðu við týska blaðið Die Welt sigur, at danir skulu hava fólkaatkvøðu um at seta evruna í gildi ístaðin fyri krónuna. Hetta samsvarar ikki við tað, sum forsætisráðharrin hevur sagt fyrr. Nógvir politikarar undrast, og teir harmast um, at forsætisráðharrin skal siga eitt í Danmark og í donskum fjølmiðlum og nakað annað í útlendskum fjølmiðlum.

# Harðligur tónleikur fekk hann at seta eld á

**Tað var ein sangur við eggjandi rútmum og harðligum teksti, sum fekk ein mann at gerast frá sær sjálvum og royna at seta eld á dýnuna hjá einum øðrum manni ímeðan hann lá og svav**

NEVNINGATING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað var ein sangur við fangandi rútmum og harðrendum teksti, sum fekk tað at sláa klikk hjá einum manni eina náttina síðsta summar.

Ein maður er ákærdur fyri drápsroynd eftir at hann breyt inn á ein annan við øks og bensini.

Í rættarmálinum verður eisini roynt at finna útav, hvat tað var, sum hevði fingið hann at fara so álvarsliga til verka.

Og í hesum sambandi hevur danski gangstara-rapparin, Niarn, ein høvuðsleiklut.

Tann ákærdi greiddi frá, at gangstara-rappur er tónleikur við einum boðskapi um harðskap, sum nokk so groft kemur til sjóndar í tekstinum.



*Í sambandi við at at maður í Føroyum er ákærdur fyri drápsroynd, spælir danski gangstara-rapparin, Niarn, ein høvuðsleiklut, tí tað var ein sangur hjá honum, sum gav honum hugskotið til at bróta inn í eini hús og at seta eld á*

Niarn hevur ein sang, sum nevnist »Stikkersvin« og tað var hesin sangurin, sum gav tí ákærda hugskotið til at seta eld á.

Tann ákærdi greiddi rættinum frá, at teir høvdu ballast í dagavís og í hesum sambandi høvdu teir spælt nógvan tónleik.

Eitt lag, sum varð spælt aftur og aftur, var »Stikkersvin« og har ljóðar niðurlagið soleiðis:

*Stikkersvin, du redder sengen som du ligger i'en*
*du vil altid være helt til grin - futtet af i et lagen af benzin*

Tann ákærdi greiddi sjálvur frá, at tað var hetta, sum gav honum hugskotið til at bróta inn til ein annan mann við bensini og øks.

Hann greiddi frá, at ætlanin var ikki at drepa, men at forskrekkja lívið úr manninum við at seta eld á dýnuna ímeðan hann lá og svav.

Í rættinum greiddu eisini fleiri onnur frá, sum høvdu ballast saman við honum, at sangurin »Stikkersvin« hevði verið nógv spældur.

Men okkurt vitni greiddi frá, at tað var ongantíð talan um at gera álvara av tí boðskapi, sum varð borin fram í sanginum

segði, at hann varð biðin um at hjálpa, tí ein maður hevði brotið inn.

Tá í teir fóru eftir ákærda, tveitti hann øksina og skrúvaði lokið av bensindunkinum so at ein ramur roykur av bensini breiddi seg í rúminum.

Hann mintist onki til, at nakað varð nevnt um dráp ella eldáseting.

Tá ið løgreglan var farin við manninum, tørnaði hann innaftur.

Ein triði maður, sum var í húsinum, varð eisini vaktur og hann fekk at vita, at talan var um innbrot.

Tá ið hann kom á staðið, var løgreglan longu komin. Tann ákærdi sat friðarligur í einum stóli, men segði, at hann skuldi drepa hin seinni.

Eisini hann føldi lukt av bensini í rúminum.

Verjin helt ikki, at teir kundu havt følt so stóran vanda, tí ongin teimum trimum monnum, høvdu leitað sær hjálp hjá lækna ella hjá sálarfrøðingi.

Hann helt heldur ikki, at maðurin, sum ákærin sigur, skuldi drepast, ljóðaði serliga bangin, tá ið hann ringdi á alarmsentralin, tí aðru ferð hann ringdi at vita, hvat varð av løgregluni, spurdi hann, um løgreglan kom ella um teir bara skuldi drepa hann

### Skuldi bukast

Trý onnur vitni, sum høvdu ballast saman við ákærda um kvøldið, vórðu eisini førd fram sum vitni.

Tey greiddu øll frá, at nógv varð drukkið og at tey høvdu tosað um mannin, sum ætlanin var at drepa sambært ákæruritinum.

Men tað hevði ongantíð verið talan um dráp ella eldáseting.

Tað, einasta, tey tosaðu um, varð, at møttu tey manninum at gøtuni, skuldi hann bukast av.

Í eini politifrágreiðing frammanundan, hevði eitt vitni sagt, at hann var bangin fyri, at ákærdi ætlaði sær heim til mannin, hann er skuldsettur fyri at ætla at drepa og tí vildi hann ikki fortelja, hvat hann búði. Eitt annað vitni hevði sagt, at hann bremsaðu ákærda og einum øðrum at fara heim til mannin, tí tað helt hann vera at fara út um mark.

Eitt vitni segði, at ákærdi var av fittastu monnum og at hetta líktust honum ikki. Eitt annað vitni legði krotini afturat, at í fyllskapi kundi mangt og hvat henda.

Eitt annað vitni segði, at ákærdi ætlaði at gera okkurt við mannin, men minnist onki um dráp ella eldáseting. Í eini politifrágreiðing áður, hevur sama vitnið sagt, at ætlanin var at brenna húsini niður, men tey orðini vildi vitnið ikki reiðiliga kennast við longur.

## Norrøna Felagið

VIÐMERKING
*Jóanes N. Dalsgaard, Kári á Røgvi*

Vit skriva hetta almenna bræv at vekja áhuga fyri Norrøna Felagnum. Serliga fyri aðalfundinum hósdagin 3. apríl.

Sum nevndarlimir har eina tíð hava vit báðir gjørt okkum nakrar tankar um felagið um virksemið tess.

Felagið hevur hálva øld á baki og eigur at vera fólksligi parturin av norðurlendska samstarvinum við Norðurlandaráðnum á odda.

Men felagið hevur tíverri ikki megnað at vunnið sær serliga stóran limaskara, felagið hevur ikki megnað at verið meginfelag hjá norrønum feløgum í Føroyum (í fleiri bygdum eru feløg, ið røkja vinarbýarsamstarv), og felagið hevur ikki verið at hoyrt í sambandi við átøkini at vinna Føroyum fulla viðurkenning í Norðurlandaráðnum.

Felagið er fíggjarliga væl fyri men avmarkar seg til fyrilestrar og útferðir, ið mest venda sjónarhorninum inneftir og aftureftir, heldur enn frameftir og kveikja norðurlendskt samstarv.

Nú hevur formansskapurin í felagnum lagt fram uppskot um broytta lóg fyri felagið.

Vit báðir halda hetta vera fínt høvi at limirnir kjakast um ætlan sína við felagnum og felagsins lut í mentunarlívi og politisku ætlanum Føroya.

Men vit mæla limunum til ikki at samtykkja uppskotið. Vit halda, at hetta uppskotið er ov nógv merkt av reglugerð og ov lítið av visjón og norðurlendskum anda. Heldur vilja vit hava nývaldu nevndina í samráði við limaskaran at orða nýtt uppskot.

Fremsta áheitan okkara skal tó vera á fólk við áhuga fyri norðurlendskum samstarvi, fyri arbeiðinum at menna norrøna fatan, fyri mentunarligari menning, um at møta fjølment á aðalfundinum, velja sterka og hugaða nevnd og geva felagnum nýtt lív.

## Halt familju mína uttanfyri politiska spælið

VIÐMERKING
*Kaj Leo Johannesen*

Tjóðveldi og Dimmalætting hava av órøttum drigið familju mína inn í politiskt spæl hjá politiskum aktørum. Hesum mótmæli eg harðliga.

Nú hendi tað, sum eg vónaði at sleppa undan. Fyri fyrstu ferð í míni tíð sum politikari er familja mín brúkt í spæli hjá politiskum mótstøðufólkum.

Á tíðindagrein í Dimmalætting í gjár, 31. mars 2008, skilji eg, at sonur mín er havdur á orði og brúktur sum skemt í røðu hjá landsstýriskvinnuni í mentamálum á flokstingi hjá Tjóðveldinum við Gjógv um vikuskiftið.

Sum pápi og politikari harmist eg stórliga um hetta. Sum vera man hevur sonur mín ongan lut í politiska virkseminum hjá pápa sínum, og tí eigur hann ikki á nakran hátt at verða brúktur í politiskum spæli hjá nøkrum. Sama er galdandi fyri restina av familju mínari.

Tað, sum landsstýriskvinnan í mentanarmálum eftir øllum at døma hevur sagt um familju mína, hoyrir ongastaðni heima og kann ikki góðtakast. Tað er rímiligt, at landsstýriskvinnan sjálv ella formaðurin í Tjóðveldinum alment tekur aftur tað, ið sagt er, og kemur við einari umbering.

Tað undrar stórliga, at Dimmalætting hevur prentað nevndu tíðindagrein. Hvar er fjølmiðlaetiska stýringin á redaktiónini? Seriøsir fjølmiðlar rokna væl saktans ikki við, at børn ella foreldur teirra skulu verja seg móti upplýsingum av hesum slagi? Eg standi spyrjandi yvir fyri journalistiska valinum, tít hava gjørt.

Tað kann gerast møtimikið at virka sum politikari her í landinum, um politisk mótstøðufólk við hjálp frá fjølmiðlum leggja eftir familjuni hjá øðrum politikarum til tess at vinna sær nøkur bílig politisk stig.